Skills 4 ReUse | Nordic Sustainable Construction

# Læraravegleiðing: Fakta um nýtslu

**Evni:**
- Ávirkan av nýtslu á veðurlag og umhvørvi, umframt møguleikar fyri endurnýtslu til at minka um ávirkanina

**Mælt tíðarlongd:**
- 30 min.

**Introskeið**

Undirvísingartilfar til at fremja burðardygd og endurnýtslu í byggivinnuni

## Innleiðsla

Fakta um nýtslu gevur eina innleiðslu til málslig frumevni og hugtøk innan burðardyggari bygging og endurnýtslu av byggitilfari. Undirvísingarevnið inniheldur fakta á lærlingastøði á yrkisskúlum. Tað fevnir um bæði privata nýtslu, landsliga nýtslu og sjálvandi nýtsluna innan byggivinnuna. Undirvísingargongdin hevur til endamáls at geva vitan, hugtøk og at skapa motivatión hjá lærlingunum til at halda fram við arbeiði við evnum um endurnýtslu av byggitilfari.

## Fyrireiking

Undirvísingarevnið er ein góð innleiðsla til framhaldandi arbeiði við evninum – lærarin eigur tí at hava lagt ætlan fyri, hvønn undirvísingarlut, sum skal koma aftaná. Næmingarnir eiga at hava atgongd til alnetið.

## Lærumál

<u>Høvuðslærumál:</u>

- Tú hevur vitan um veðurlags- og umhvørvistrupulleikar.
- Tú kanst geva dømi um ávirkan av nýtslu á bæði veðurlag og umhvørvi.
- Tú kanst geva dømi um ávirkan av byggivinnuni á veðurlag og umhvørvi.

**Leggur eisini afturat:**

- Tú ert tilvitaður um møguleikarnar hjá byggivinnuni at minka um nýtsluna.
- Tú ert tilvitaður um, hvussu tú sum handverkari kanst minka um nýtsluna.

# Læraravegleiðing: Fakta um nýtslu

## Innihald og endamál

Ávirkan av nýtslu á veðurlag og umhvørvi yvirhøvur

- Minkingarmøguleikarnir í endurnýtslu
- Dømi úr privatlívinum
- Professionel dømi úr Norðurlondum, bæði á makro (byggivinna) og mikro (handverkarans) støði
- Fimm spurningar um nýtslu – lærlingurin kann finna svar í tekstinum og møguliga eisini leggja afturat við aðrari vitan
- Endamálið við fakta um nýtslu er at økja lærlingarnir vitan um bæði privata nýtslu og ávirkanina av nýtslu innan byggivinnuna á veðurlag og umhvørvi.

## Uppskot til undirvísingargongd

<u>Lærarapresentatión (5 minuttir)</u>

Presentatiónin fevnir um hesi evni:

- Vísa, hvar fakta um nýtslu kann finnast á heimasíðuni
- Skjót gjøgnumgongd av innihaldi og spurningum

<u>Sjálvlesnaður (20 minuttir)</u>

- Les tekstin og fylg leinkjum fyri at fáa meira kunning (videobrot, interaktiv kunning)

Møguliga

- Formulera 1-2 spurningar um tilfeingi, veðurlag/umhvørvi og endurnýtslu
- Skifta við ein floksfelaga og svara hvør sínum spurningum

<u>Samandráttur í felag (5 minuttir)</u>

- Dømi um egnu spurningar og svar hjá lærlinginum
- Nakrir spurningar?

## Sundurgreining

Undirvísingarevnið kann sundurgreinast á floksstøði og einstaklingastøði.

Flokssundurgreining hendir, tá lærarin kann velja at taka við ella ikki taka við partinum, har næmingarnir sjálvir skulu formulera og svara hvørjum øðrum spurningum.

Einstaklingssundurgreining hendir, tá lærlingarnir kunnu velja bert at lesa tekstin/fáa tekstin upplisin ella at trýsta seg víðari til videobrot og interaktivar heimasíður fyri at fáa meira kunning. Harumframt er møguleiki hjá lærlinginum at finna meira viðkomandi kunning sjálvur.

# Læraravegleiðing: Fakta um nýtslu

## Feedback og virðismeting

Møguligir sjálvformuleraðir spurningar og svar kunnu geva eina ábending um, í hvønn mun lærlingarnir hava hugleitt um týdningin av tilfeingistrupulleikum og endurnýtslu sum eina loysn. Næsta undirvísingarevnið "felags kjak" gevur víðari vitan um, hvussu væl lærlingarnir hava skilt evnið. Jú meira lærlingurin kann brúka fakta og hugtøk frá "fakta um nýtslu" í "felags kjak", tess betri.